**Álit II**

**í**

**løgtingsmáli nr. 19/2015: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar partar av broytingum í hjúnabandslógini og rættarvirknaðarlógini**

Sonja J. Jógvansdóttir, Bjørt Samuelsen, Hanna Jensen og Kristianna Winther Poulsen, tingmenn, hava lagt málið fram tann 17. november 2015, og eftir 1. viðgerð 24. november 2015 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum 1., 10. og 15. desember 2015, 19., 21. og 26. januar, 9., 16., 23. og 25. februar, 1. og 7. mars 2016. Við 2. viðgerð 16. mars 2016 varð málið beint aftur í nevnd. Nevndin hevur síðan viðgjørt málið á fundum 17. og 29. mars, 5., 13. og 19. apríl 2016.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Ásvør Skaalum og Katrinu Lindenskov Holm, sálarfrøðingar, John Kølbæk, fúta, umboð fyri Ja til hjúnabandið, samkomuleiðara í Lívdini, Kommunufelagið, umboð fyri LGBT, umboð fyri Amnesty International, umboð fyri Kvinnufelagið í Havn, Jógvan Fríðriksson, bisp, samkomuleiðarar í Kelduni, Sirið Stenberg, landsstýrismann í heilsumálum, saman við Gigni, Rigmor Dam, landsstýrismann í mentamálum, Jákup N. Olsen umboð fyri Ebenezer, umboð fyri Kirkjuligu heimamissiónina, John í Skemmuni, trúboðara, Dan M. Knudsen, ríkisumboðsmann, umboð fyri foreldrabólkin hjá LGBT Føroyum og Aksel V. Johannesen, løgmann.
Eftir at málið varð beint aftur í nevnd, hevur nevndin havt fund við Johnhard Klettheyggj, stjóra í Løgtinginum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Katrin Kallsberg, Sonja J. Jógvansdóttir, Óluva Klettskarð og Djóni N. Joensen) hevur hesar viðmerkingar:

Verður uppskotið samtykt, fáa samkynd rætt at giftast borgarliga og fáa øll tey borgarligu rættindini og skyldurnar, sum fylgja við.

Undan aðru viðgerð varð broytingaruppskot lagt fram um gildiskomuna av uppskotinum, og verður tað hetta, sum viðgjørt verður í álitinum hjá meirilutanum. Fyri útgreinandi viðmerkingar um avleiðingar av uppskotinum annars ber til at hyggja í fyrra álitið frá meirilutanum.

Í broytingaruppskotinum verður lagt upp til, at lógin kemur í gildi, tá ið § 14, stk. 2 er umorðað ella strikað.

Verður uppskotið samtykt, kann verandi siðvenja, at hinskynd kunnu fáa signing av borgarligari giftu, halda áfram óbroytt.

Í uppriti til Trivnaðarnevndina hevur umsitingin í Løgtinginum víst á, at um § 14, stk. 2 varð strikað, hevði ongin við lógini í hondini kunnað kravt, at fólkakirkjan skuldi signað eitt borgarligt hjúnalag. Fólkakirkjan hevur ritual at signa hinskynd borgarliga gift pør, og hóast § 14, stk. 2 verður strikað, kann henda siðvenja halda óbroytt fram.

Mentamálaráðið hevur í uppriti til Løgtingið víst á, at um § 14, stk. 2 varð strikað, hevði tað – á sama hátt, sum tað er hjá hinum trúarsamfeløgunum í dag – verið upp til Fólkakirkjuna sjálva, um hon valdi at hava ritual at signa borgarliga gift pør.

Biskupur hevur í svarskrivi til nevndina upplýst, at hann er samdur við tulkingini hjá Mentamálaráðnum.

Umsitingin og biskupur eru sostatt á einum máli um, at um § 14, stk. 2 verður strikað ella umorðað, verður ikki møguligt hjá borgarliga giftum samkyndum pørum at fáa giftuna signaða í fólkakirkjuni.

Tað hevur verið av stórum týðningi at tryggja, at lógin lm. nr. 19/2015 gevur møguleika fyri borgarligari giftu av samkyndum, hvørki meira ella minni. Tað hevur ikki verið ætlanin at geva borgarliga giftum samkyndum pørum lógartryggjaðan rætt til signing av giftuni í kirkju. Slíkar spurningar metir meirilutin sum innaru kirkjulig viðurskifti, sum kirkjan sjálv skal taka støðu til.

Verður lógin samtykt, heldur verandi siðvenja hjá kirkjuni óbroytt fram. Hinskynd fara framhaldandi at kunna gifta seg í kirkju, og hinskynd fara framhaldandi at kunna fáa signing.

Framlagda broytingaruppskotið mælir til í fyrra lagi at strika § 14, stk. 2, ella í øðrum lagi at umorða greinina soleiðis, at eingin ivi er um, at verandi siðvenja í kirkjuni, har borgarliga gift hinskynd pør kunnu fáa hjúnabandið signað í fólkakirkjuni – eftir teimum ritualum, sum fólkakirkjan longu í dag brúkar.

Løgfrøðiliga ber ikki til at strika § 14, stk. 2 í sambandi við verandi uppskoti (jvb skjal A í.s.v. løgtingsmál nr.19/2015).

Landsstýriskvinnan í heilsu- og innlendismálum (familjumálum) hevur játtað, at hon alt fyri eitt fer at taka neyðug stig til at fáa avvarðandi danska myndugleika at strika ella umorða § 14, stk. 2 í hjúnabandslógini. Broytingaruppskotið ásetir, at lógin ikki fær gildi, fyrr enn hetta er framt.

Meirilutin setir fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

1. Í § 1 verður ”I lov nr. 37” broytt til: ”I anordning nr. 37”.
2. Í § 1, nr. 2 verður í § 1 ”borgerligt ægteskab” broytt til: ”borgerligt indgået ægteskab”.
3. § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis:
   "*Stk. 1.* Anordningen træder i kraft, når § 14, stk. 2 i anordning om ægteskabs indgåelse og opløsning er ophævet eller omformuleret således, at den ikke giver ret til velsignelse af borgerligt indgået ægteskab mellem to personer af samme køn."

<u>Viðmerkingar til einstøku broytingarnar:</u>
<u>Til nr. 1:</u> Talan er um “anordning” ikki “lov”.

<u>Til nr. 2:</u> Orðingin “borgerligt ægteskab” verður broytt til ”borgerligt indgået ægteskab”. Undir nevndarviðgerðini hevur verið víst á, at tað er bert eitt slag av ”ægteskab” uttan mun til, um talan er

um borgarliga ella kirkjuliga vígslu. Tí verður ikki mett, at tað er rætt at skriva ”borgerligt ægteskab”. Hetta verður nú rættað til ”borgerligt indgået ægteskab”.

Til nr. 3:
Ætlanin við broytingini í hjúnabandslógini er at geva samkyndum pørum rætt til borgarliga giftu, tó uttan at lóggeva inn um kirkjugátt.

Tulkingarósemja er um, hvørt samkynd borgarliga gift pør eftir ásetingini í § 14, stk. 2 í hjúnabandslógini kunnu krevja at verða signað í kirkjuni. Til tess at beina burtur allan iva er skotið upp, at § 14, stk. 2 í hjúnabandslógini annaðhvørt verður strikað ella umorðað.

Hjúnabandslógin er framvegis felags málsøki. Løgtingsumsitingin hevur víst á, at Løgtingið ikki kann broyta § 14, stk. 2 av sínum eintingum. Tí er neyðugt, at landsstýrismaðurin í familjurættarmálum (Innlendis- og heilsumálaráðið) tekur upp málið við danska ráðharran á økinum soleiðis, at omanfyrinevnda broyting kann fremjast sum skjótast.

Við hesum broytingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Kaj Leo Holm Johannesen, Jenis av Rana og Jógvan á Lakjuni) er, nú málið aftur hevur verið í Trivnaðarnevndini, framvegis sannførdur um ikki at taka undir við tí og mælir enn einaferð Løgtinginum staðiliga frá at samtykkja tað.

At lóggeva á henda hátt í einum av størstu og álvarsligastu málum, sum nakrantíð hevur verið fyri á tingi, er ósømiligt fyri háttvirda lóggávuting okkara.

Minnilutin vísti í tí fyrra álitinum á, at málini um at broyta hjúnabandið eru ófullfíggjað og illa frágingin frá uppskotssetarunum. Mestsum ongar viðmerkingar eru til málini og eingin útgreining av nøkrum slag um langtíðar avleiðingar ella um lógarbroytingar, sum skulu gerast, verður tað samtykt at gera hjúnabandið kynsneutralt. Málini vórðu enntá ikki send til hoyringar nakrastaðni – heldur ikki til kirkjuna, hóast ætlanin var at lóggeva inn í kirkjuna!

Upprunaliga vóru 3 uppskot, men eitt av teimum, tingmál nr. 21, varð afturtikið, tí fólk sóu, at undirtøka fekst ikki fyri tí, orsakað av, at alt tað “kirkjuliga landslagið” mótmælti tí prinsipiella spurninginum, at Løgtingið uttan nakað kjak og uttan nakra hoyring yvirhøvur ætlaði at lóggeva inn í kirkjuna. Øll, sum hava við kirkjuna at gera, hava víst á, at tað er prinsipielt skeivt at lóggeva um kirkjulig viðurskifti, uttan at kirkjan hevur tikið lut í lógarsmíðinum.

Tá ið tingmál nr. 21 varð afturtikið, varð greitt, at nú lá leiðin fyri signing av borgarliga giftum av sama kyni opin inn í kirkjuna. § 14, stk. 2 í hjúnabandslógini sigur: *“Ægtefæller kan få et ægteskab, som er indgået ved borgerlig vielse, kirkeligt velsignet af en præst i folkekirken”.* T.v.s., at tey, sum eru borgarliga vígd – eisini tvey av sama kyni, um hetta varð samtykt – hava nú krav upp á vælsignilsi í kirkjuni.

Hóast meirilutin í Trivnaðarnevndini í sínum áliti royndi at bagatellisera henda spurningin, løgdu tríggir av uppskotssetarunum saman við tveimum øðrum tingmonnum fram broytingaruppskot til aðru viðgerð. Hetta varð gjørt, sum tey orða seg í viðmerkingunum, fyri “at binda um heilan fingur”

– Hetta má sigast at vera eitt sera sjáldsamt broytingaruppskot, sum neyvan man hava sæð sín líka nakrantíð áður.

Her verður sett inn í gildiskomuna av uppskotinum: *"Anordningen træder i kraft, når § 14, stk. 2 i anordning om ægteskabs indgåelse og opløsning er ophævet eller omformuleret således, at den ikke giver ret til velsignelse af borgerligt indgået ægteskab af samme køn."* T.v.s., at lógin, um hon verður samtykt, ikki kemur í gildi, fyrrenn stk. 2 í § 14 í hjúnabandslógini er strikað ella broytt.

Trivnaðarnevndin hevur, meðan málið hevur verið í nevndini, sent løgtingsumsitingini og biskupi spurningar í hesum sambandi.

Spurdur um, hvussu hetta broytingaruppskotið fer at ávirka løgtingsmál nr. 19, sigur løgtingsstjórin, sum er hægsti løgfrøðiligi myndugleiki í Løgtinginum, m.a.: *"Fyrri liðurin í broytingaruppskotinum er greiður.." "....Hinvegin er verri at fyrihalda seg til seinna liðin, tí einki verður sagt um, hvussu ein slík broyting av § 14, stk. 2 skal síggja út, og tí er tað eitt sindur trupult at siga, júst hvussu hetta kemur at ávirka lm. nr. 19."* ....... *"Tí er* vandi fyri*, alt eftir, hvat seinni møguliga kemur at henda við § 14, stk. 2, at lm. nr. 19/2015 ongantíð verður sett í gildi, hóast hetta verður samtykt í Løgtinginum."*

Minnilutin heldur, at tað er púra burturvið og óforsvarligt av Løgtinginum at samtykkja nakað, sum er so óvist, og tann, sum lesur uppritið frá løgtingsstjóranum til Trivnaðarnevndina, má ásanna, at slík lóggáva, sum her er ætlanin at fremja, er óvirðilig. Umsitingin sigur veruliga, at hon ikki kann siga, hvat fer at henda, og fyri henni er einki broytt í mun til upprunauppskotið, og víst verður til ivamálini í uppritinum frá 4. des. 2015. Málið er so lítið ítøkiligt, at sagt verður m.a., at *"umsitingin ímyndar sær, at um § 14, stk. 2 skal broytast, fer hetta at krevja tingingar við danskar myndugleikar, og at tað málið allarhelst skal gjøgnum bæði Fólkatingið og Løgtingið, áðrenn hetta gerst veruleiki."*

Eisini verður aftur her víst á ta óvanligu mannagongd, sum er nýtt í sambandi við málið, og sum er orsøkin til mangar ógreiddar spurningar. Víst verður á, at vanlig mannagongd er, at danskir myndugleikar venda sær til landsstýrið at vita, hvørt føroyingar ynskja ávísa nýggja danska lóg setta í gildi her, ella at landsstýrið vendir sær til danskar myndugleikar fyri at fáa eina ávísa danska lóg setta í gildi í Føroyum. Síðan sigur umsitingin víðari: *"Í báðum førum vildi samskifti á embætismannastigi havt fingið avklárað, hvat føroyingar ynskja, hvørt hetta løgfrøðiliga letur seg gera, og hvørjar fylgibroytingar eru neyðugar. Av tí at lm. nr. 19 byrjar sum eitt uppskot í Løgtinginum, leyst av landsstýrinum, so eru slíkir spurningar ikki avkláraðir við donsku myndugleikarnar frammanundan".*

Minnilutin heldur, at viðmerkingarnar frá umsitingini um, at ikki er avklárað, hvørt hetta løgfrøðiliga letur seg gera, og hvørjar fylgibroytingar eru neyðugar, áttu at fingið tingmenn at aftra seg við at lóggeva á henda hátt – og ikki minst tann seinasti setningurin í sambandi við gildiskomuásetingina, har sagt verður, at hóast hetta løgfrøðiliga ber til, so kann tað "*tykjast margháttligt at samtykkja nakað nú, sum ikki kann fáa gildi, fyrr enn Løgtingið seinni eisini hevur viðgjørt aðra broyting, og harvið viðgjørt málið óbeinleiðis einaferð afturat.*"

Sum longu nevnt, sendi Trivnaðarnevndin eisini biskupi spurningar í hesum sambandi.

Biskupur lýsir greitt sína fatan av hjúnalagnum millum mann og konu, sum er ankrað í skapanarsøguni.

Í svarinum í sambandi við spurning, sum biskupur fekk frá Trivnaðarnevndini um upprit frá Mentamálaráðnum 22/2 - 2016 í samband við tað afturtikna uppskotið, ger biskupur greitt, at tað er ivasamt, um niðurstøðan hjá MMR er, at spurningurin um signing í kirkjuni er loystur, hóast § 14, stk. 2 verður strikað, og hann vísir á, at orðingin í broytingaruppskotinum óbeinleiðis er ein mótsøgn til skrivið, ið tað innankirkjuliga landslagið orðaði 15. januar 2016, har sagt varð:

- Vit meta tað vera prinsipielt skeivt at lóggeva um kirkjulig viðurskifti, uttan at Fólkakirkjan hevur tikið lut í lógarsmíðinum.
- Vit meta tað vera prinsipielt skeivt at blanda lógarsmíð um borgarliga giftu upp í kirkjuliga lógarsmíðið.
- Vit meta tað vera prinsipielt skeivt at diskriminera ávísan bólk av fólki í løgtingslóg um Fólkakirkjuna.

Tað vil siga, at um broytingaruppskotið verður samtykt, so gera vit okkum framvegis inn á hetta, sum alt tað innankirkjuliga landslagið er samt um, júst sum gjørt varð, tá ið ætlanin var at lóggeva inn í lógina um at brúka kirkju og um limaskap í fólkakirkjuni í tingmáli nr. 21.

Tað er eisini so eyðsýnt her, at strika vit § 14, stk. 2 í hjúnabandslógini, so taka vit tann lógartryggjaða rættin, borgarliga vígd hjún hava í dag, at verða signað í kirkjuni, frá teimum og lóggeva á henda hátt inn í kirkjuna.

Ein av høvuðsorsøkunum til, at málið varð beint aftur í nevnd, var júst spurningurin um, hvørt vit lóggeva inn í kirkjuna ella ikki. Men við hesum broytingaruppskotinum er spurningurin ikki loystur. Her er eingin ivi burturbeindur, og her er als ikki bundið um heilan fingur, soleiðis sum ætlanin sambært uppskotssetarunum er.

Minnilutin fer eisini at loyva sær at endurgeva brot úr áhugaverdari samrøðu við Hans Gammeltoft-Hansen í Credo 20. mars 2016, har hann viðgjørdi spurningin um hjúnabandið, lóggávumyndugleikan og Fólkakirkjuna. Gammeltoft segði: *"Hvis Folketinget vedtager en lov om, at ægteskaber mellem personer af samme køn skal sidestilles med ægteskaber mellem personer af forskelligt køn, så er det altså noget, Folketinget på ministerens foranledning og lovforslag kan bestemme, og det er så reglerne, de borgerlige regler, der hersker i samfundet omkring, hvad ægteskaber er, og hvem der kan indgå ægteskaber. Og det er ikke et indre kirkeligt anliggende. Så hvis kirken stadigvæk ønsker at udøve borgerlig myndighed, være ægteskabsstiftende og ikke kun ægteskabsvelsignende, så må kirken jo rette sig efter de borgerlige regler".*

Minnilutin er sannførdur um, at tað ber ikki til at gera hjúnabandið kynsneutralt uttan at gera seg inn á kirkjuna. Verður farið inn í hjúnabandslógina, so sleppur kirkjan ikki undan. Og tað er eisini sjón fyri søgn, um vit hyggja rundan um okkum til tey londini, sum hava lóggivið á henda hátt – nú síðst í Noregi, har hetta málið hevur skapt eitt øgiligt stríð í tí norsku kirkjuni. Minnilutin vónar ikki, at tað sama fer at henda her hjá okkum, men verður hetta uppskotið samtykt, er stórur vandi fyri hesum.

Víst verður annars til tað fyrra álitið hjá minnilutanum, har komið varð inn á mong onnur álvarslig viðurskifti í samband við at taka eitt so hættisligt stig sum at gera hjúnabandið kynsneutralt. Tí

verður tað samtykt, fer tað at fáa stórar avleiðingar fyri samfelag okkara frameftir og verður orsøk til eina radikala umbroyting av allari fatan av familju, hjúnalagi og samlívi. Her verður latið upp fyri nøkrum, sum fer at broyta alla siðvenju, og verður orsøk til eina mentanarkollvelting og eitt siðaskifti í Føroyum, ið gongur beint ímóti tí kristnu siðalæru, sum samfelag okkara í øldir hevur bygt á. Her eru mangir álvarsligir spurningar, sum als ikki eru viðgjørdir. Spurningar, sum fara at hava víðfevndar avleiðingar fyri komandi ættarlið.

Minnilutin undrast framvegis stórliga á, at samstundis, sum samgongan arbeiðir við at yvirtaka persóns-, familju- og arvarættarøkið, arbeiða samgongulimir á henda sera ivasama hátt við at broyta danskar lógir, sum skulu yvirtakast í næstum. Spurningurin er, hví ikki verður bíðað, til økið er yvirtikið.

Minnilutin er framvegis sannførdur um, at vit eiga at halda fast við hjúnabandið millum ein mann og eina konu, og fara vit av leið her, so vita vit ikki, hvar vit enda.

Húskið við manni, konu og børnum hevur altíð verið kjarnin og grundeindin í samfelagi okkara, og eingin ivi kann vera um, at ein familja, har mamma og pápi eru tilvitað um sína ábyrgd, er besti karmur um ein natúrligan og góðan uppvøkstur. Júst tað, at maður og kona eru ólík, ger, at mamman og pápin eru teir týdningamestu identifikatiónspersónarnir og fyrimyndirnar hjá barninum og hava stóran týdning fyri menningina av samleikanum og sjálvsmyndini hjá einum barni.

Minnilutin tekur ikki undir við málinum og mælir staðiliga Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Trivnaðarnevndin, 20. apríl 2016**

Katrin Kallsberg
formaður

Kaj Leo Holm Johannesen

Óluva Klettskarð

Jenis av Rana

Djóni Nolsøe Joensen

Sonja Jógvansdóttir

Jógvan á Lakjuni